| English version |

Leita á sev.fo Leita

Kundar El innleggjarar Prísir SEV Starvstorgið

Lurta

# Gjaldskrá

**GJALDSKRÁIN hjá SEV**

Galdandi frá 1. januar 2014.

**GJALDSKRÁIN VIÐ OG UTTAN MVG ER HENDAN FYRI HVØRJA ELINNLEGGING**

| Ársnýtsla kWh | Fast gjald | | Prísur fyri kWh | |
|---|---|---|---|---|
| | u/MVG | v/MVG | u/MVG | v/MVG |
| 0 - 10.000 | 480,00 | 600,00 | 1,51 | 1,89 |
| 10.000 - 100.000 | 1.280,00 | 1.600,00 | 1,43 | 1,79 |
| yvir 100.000 | 5.280,00 | 6.600,00 | 1,39 | 1,74 |

Nýtarar við ársnýtslu størri enn 5 mió. kWh kunnu fáa serliga gjaldskrá.
Fast gjald, sum eigarin hevur ábyrgd av, verður goldið fyri innleggingar, ið ikki verða nýttar, men enn ikki eru uppsagdar.

Tá ið streymveitingin er slitin vegna brek á innleggingini, har málarin ikki verður niðurtikin, verður fasta gjaldið bert kravt fyri tíðina, innleggingin er íbundin hjá SEV.

**ÍDNAÐUR, LANDBÚNAÐUR, FISKIVINNA V.M.**
Serstøk gjaldsskrá er galdandi fyri ídnaðarvirkir, fiskaaling, landbúnað, fiskivinnu og ávísar edv-tænastur. Gjaldskráin við og uttan MVG fyri nevndu vinnur er henda fyri hvørja elinnlegging

| Ársnýtsla kWh | Fast gjald | | Prísur fyri kWh | |
|---|---|---|---|---|
| | u/MVG | v/MVG | u/MVG | v/MVG |
| 0 - 10.000 | 480,00 | 600,00 | 1,51 | 1,89 |
| 10.000 - 20.000 | 1.280,00 | 1.600,00 | 1,43 | 1,79 |
| yvir 20.000 | 9.080,00 | 11.350,00 | 1,15 | 1,44 |

Neyvari upplýsingar um, hvørjar vinnugreinar koma undir hesa gjaldskrá, fáast við at venda sær til eina av skrivstovum elfelagsins.

**HÁSPENNINGSMÁTING**
Fyri tær innleggingar, har SEV eftir umstøðunum avger at máta streymin á háspenningsstøði, t.d. 10 ella 20 kV, verða omanfyri nevndu kWh-prísir lækkaðir við 1,5 %. Við háspenningsmáting verður fasta gjaldið ásett á sama hátt, sum fyri elinnleggingar sambært omanfyri tilskilaðu ásetingum, men verður eitt fast gjald ásett fyri hvørt mátistað og ikki hvørja elinnlegging, sum er íbundin aftaná mátistaðið.

**YMISK ÓMAKSGJØLD V.M.**
**Verða gjøld ikki goldin rættstundis** sambært rokning/giroinngjaldskort, verða fyri hvørjar byrjaðar 100 kr. av rokningsupphæddini lagdar kr. 1,00 afturat rokningini hvønn byrjaðan mánað, til falna skuldin er goldin. Harafturat skulu gjaldast kr. 15,00 fyri hvørja áminning.

**Tá neyðugt er at taka stig til at slíta streymveitingina** vegna eftirstøðu, skulu gjaldast kr. 200,00 í ómaksgjaldi.

**Fyri íbinding aftaná slíting** vegna eftirstøðu skulu gjaldast kr. 200,00 í ómaksgjaldi. Um íbundið verður uttanfyri vanliga arbeiðstíð eftir áheitan frá eigara/brúkara, verður ómaksgjaldið kr. 300,00.

**Málarin kann verða kannaður**, tá biðið verður um tað.
Um málarin er í lagi, verða kr. 500,00 kravdar í ómaksgjaldi.

**FLYTING**
Tá flutt verður, skal málarin lesast av, og SEV skal hava fráboðan um avlesturin.
**Tann, sum flytur, hevur skyldu at gjalda, til málarin er avlisin.**

**FYRIBILS STREYMVEITING**
Tá fyribils streymveiting verður veitt til byggipláss, stuttleikaøki o.a., eru hesir prísir galdandi:

| | |
|---|---|
| Fast gjald: | Eftir vanligu gjaldsskránni. |
| Elorkugjald: | 20% afturat prísinum eftir vanligu gjaldskránni. |
| Trygd: | Kann verða kravd. |

Allar útreiðslur í sambandi við fyribils streymveiting, so sum styrking av neti ella

## Eldri Gjaldskráir

2013

2012

2011

2008

víðkan, verða goldnar frammanundan eftir rokning.

**VANLIG ÍBINDING**
Innleggingin verður íbundin, tá liðugtfrásøgn er komin frá góðk. elinnleggjara, og møgulig brek eru rættað.
Nýtarin skal gera teymin millum veitingarstaðið og innleggingina. Um teymurin verður longri enn 50 m, letur SEV ískoyti til kaðal og veit. Ískoytið verður givið fyri tað talið av metrum, sum teymurin er longri enn 50 m, tó í mesta lagi fyri 200 m. Gjaldið verður ásett av SEV og verður goldið nýtaranum, tá hann vendir sær til SEV við avriti av rokningi frá elinnleggjara. Innleggingar við ongum málara fáa ikki ískoyti.
Nærri upplýsingar um støðd á ískoyti fæst við at venda sær til SEV.
Tá nýtarin skiftir luftteym út til kaðalteym við sama tvørmáti, letur SEV ískoyti til kaðalkostnaðin.

**ÍBINDINGARGJALDIÐ**
- Áðrenn bundið verður í elnetið hjá SEV, skal íbindingargjald gjaldast samb. gjaldskránni.
- Verður innlegging broytt, soleiðis at teymasikring má gerast størri, skal íbindingargjald latast, sum svarar til munin millum sikringarnar. SEV setir nýggju sikringina í, tá goldið er.
- Um minni teymasikring verður sett í til eina verandi innlegging, verður einki íbindingargjald goldið aftur.
- Íbindingargjaldið er knýtt at teyminum til eitt ávíst matr. nr., og teymurin kann flytast innan fyri hetta matr. nr., um so er, at hetta ikki verður til útreiðslur fyri SEV. Í serligum førum, tá talan er um náttúrliga samanhoyrandi ognir, kann við góðkenning stýrisins í hvørjum føri sær gerast frávik frá ásetingini um tilknýti til eitt ávíst matr.nr.
  Um nýtari vil hava íbinding aðrastaðni í elveitingina hjá SEV, skal nýtt íbindingargjald gjaldast samb. galdandi gjaldskrá.

**GJALDSKRÁ FYRI ÍBINDINGARGJALD**

| | |
|---|---|
| Íbinding, max 35A: | 13.030 kr. |
| Íbúðarbygging við felags teymi: | 9.800 kr. fyri íbúðina |
| Innleggingar uttan málara:<br>tó max 20 W | 13.030 kr. fyri teymin |
| Innleggingar størri enn 35A:<br>(A=tal av Amp. yvir 35) | 13.030 kr. + (Ax 1.185) kr. |
| Avsíðis liggjandi innleggingar | Veruligar útreiðslur fyri SEV<br>minus trý vanlig íbindingargjøld,<br>tó í minsta lagi áður nevndu upphæddir. |
| Vindmyllur: | Serligar reglur. |
| Fyribils innleggingar: | Veruligar útreiðslur fyri SEV. |
| Byggipláss, ítriv o.a. | Veruligar útreiðslur fyri SEV. |
| Nullingsloyvið: | 10.000 kr fyri innleggingina |

Um víðkan av einstøkum avsíðis liggjandi innleggingum viðførir, at SEV má útbyggja netið, má umsøkjarin bera kostnaðin av hesum.

Omanfyri nevndu íbindingargjøld eru galdandi fyri 400 V spenning, jbr. eisini § 8 í streymveitingartreytunum. Fyri veitingar við hægri spenningi verður A-talið umroknað lutfallsliga samsvarandi tí A-talið, viðkomandi veiting skuldi havt við 400 V spenningi.

**TILTØKUGJALD (EFFEKTGJALD)**
Elinnleggingar, sum fáa elmegi frá egnari framleiðslu (ella frá øðrum enn SEV), kunna fáa loyvi at brúka elveitingina hjá SEV sum trygd móti at gjalda eitt árligt gjald uppá 1.100,- kr. fyri hvørt kW í installeraðum framleiðslumátti (ávikavist nýtslumátti) hjá viðkomandi elinnlegging, tó í mesta lagi svarandi til teymasikringina mótvegis elnetinum hjá SEV.

**MVG**
Afturat frammanfyri nevndu gjaldskráum, ómaksgjøldum, íbindingargjøldum v.m. verður kravt MVG.

Soleiðis samtykt av nevndini hjá SEV at galda frá 1. januar 2014.

**ELFELAGIÐ SEV**

Starvsfólk

Leiðsla
Fyrisiting og Stápsfunktiónir
Framleiðsla
Verkfrøði og eltøknideild
Rakstrardeild
Innleggingardeild
Teknistova

Snarvegir

Prísir
Flyting
Skil tína uppgerð
Fjaravlestur

SEV
Landavegur 92
Postsmoga 319
FO-110 Tórshavn
Tel.. +298 346800
email: sev@sev.fo